## Stórur UEFA-áhugi í Aalborg

Áhugin fyri seinna UEFA Cup dystinum hjá AaB ímóti Sampdoria er sera stórur. AaB stóð seg heilt væl í fyrra dystinum ímóti italska liðnum á útivølli, og javnleikurin, sum danska liðið hevði við sær heimaftur, er gott útgangsstøði til seinna dystin. Fyrsta tíman eftir fyrra dystin, vórðu 1000 atongumerki til seinna dystin, sum verður spældur í Aalborg, seld, og nú er talið á áskoðarum komið upp á 11.000.



## Notodden vann aftur

Norska felagið Notodden, sum hevur leigað vágbingin Símun Samuelsen frá Keflavík, vann í gjár í næstbestu norsku fótbóltsdeildini. Notodden hevur ligið í botninum, men við næsta sigrinum á rað, eydnaðist tað Notodden at toga seg burtur frá hinum botnliðnum. Símun Samuelsen spældi við allan dystin, men tað var toppskjúttin Kenneth Kvalheim, sum stjól myndina, tí hann skoraði øll málini í 5-2 sigrinum hjá Notodden á útivølli ímóti Sparta Sarpsborg.

# GÍ-viljin søkti KÍ

**GÍ var nógv grammari enn heimaliðið, sum tóktist verða farið í vetrarfrí, og so fóru gøtumenn avstað við øllum stigunum og trivaligum sigri**

*KÍ*

*GÍ*

**KÍ-GÍ**
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

KÍ og GÍ hava ikki tað stóra at spæla fyri í Formuladeildini. Bæði liðini eru leys av niðurflytingarvandanum, og hvørki av liðunum kann náa liðunum, sum eru stødd langt frammanfyri.

Tí var dysturin í Klaksvík sunnudagin ein stór avbjóðing fyri spælararnar. Hvør hevði motivatiónina til at vinna ein dyst, sum hevði lítið at siga, og sum varð spældur í illfýsnum veðri.

Her var GÍ nógv tað grammara liðið, og gøtumenn vunnu stórsigur á teimum illa uppløgdu klaksvíkingunum.

Fyrri hálvleikur var rímiliga javnur, men GÍ hevði gott tak á miðvøllinum. GÍ'arnir vóru skjótari á leysum bóltum, teir vunnu nógvar nærdystur, og so komu teir til einstakar kjansir.

Í løtum vóru glottar at hóma á KÍ-liðnum, men tann ferðin og tann innsatsur, sum eyðkendi liðið fyrr í summar, var als ikki til staðar.

### GÍ var vandamiklari

KÍ var sjálvt við til at seta GÍ í gongd. Ein langur bóltur fram í KÍ-brotsteigin tóktist vandaleysur. Jan Andreasen hevði tak á støðuni, men tann ídni Christian Lundbjerg fekk lirka bóltin frá honum, og tá hann spældi upp á tvørs í brotsteignum, segði álopsfelagin Hendrik Rubeksen takk fyri og sendi bóltin í málið til 1-0.

KÍ hevði lítið at bjóða upp á í fyrra hálvleiki. Onkra einstaka ferðina var eitt sindur av vanda á ferð eftir innlegg, men opni kjansurin kom ongantíð.

Í seinna hálvleiki var myndin tann sama. Heimaliðið kom ikki upp í ferð, og GÍ helt á fram við sínum ágangandi spæli. Tá ið ein lítil tími var spældur, økti Christian Lundbjerg upp í 2-0 eftir innlegg úr vinstru.

KÍ royndi at svara aftur og hevði sína frægastu løtu eftir hetta málið, men Geza Turi hevði tvær góðar bjargingar, og so hevði heimaliðið ikki meira skjúts.

Sverri Jacobsen stútaði eitt hornaspark í málið eitt korter fyri tíð, og so setti Hendrik Rubeksen puntum, tá hann gjørdist leysur, fintaði málmannin og sendi í tóma málið til 4-0.

GÍ-spælararnir kundu fara stoltir aftur til Gøtu, meðan teir á heimaliðnum kundu snikja seg undir brúsuna og so heim at sleikja sárini eftir dyggasta ósigurin í hesum kappingarárinum.



*Christian Lundberg stórtreivst í bláa KÍ-búnanum í fjør. Nú er tað GÍ, sum málini verða skotin fyri, og hetta mátti KÍ sanna sunnudagin*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# FM í triathlon

**Sunnudagin verður FM-kapping í 1/4 triathlon**

**TRIATHLON**
*Tíðindaskriv*

Kappingin byrjar klokkan 13, men fyrireikararnir heita tó á tey íðkandi um at møta ein tíma undan hesum.

Svomið verður 1500m í svimjihøllini. Súkklað verður frá høllini, til Kaldbaks, Kaldbaksbotn, Kaldbak, rundkoyringina við R.C. Effersøesgøtu, og oman til Plantusøluna. Teinurin er 40 km. Runnið verður so frá Skógrøkt Landsins, fram við Strond til Eik Bankan, og aftur til Skógrøkt Landsins. Teinurin er 5 km og skal rennast tvær ferðir.

Vinnarin hjá monnum tey seinastu nógvu árini, Gunnar Dahl Olsen, hevur lítið og einki gjørt við triathlon í ár. Hann hevur hildið seg til súkklingina, har er hann sterkur, men hann hevur kappingarandan og letur ongan sleppa fram um við góðum. Hinvegin eru Gudmundur Joensen og Andrass Joensen væl fyri. Báðir vóru við triathlonliðnum á Oyggjaleikunum, og stóðu seg væl.

Áslakur Nesá er júst skorin í knæið, so hann verður tí ikki við, og Ottar í Hjøllum er farin av landinum.

Eli Christiansen stóð seg væl í tíðarsúkklingini í Íslandi, hann er gamal svimjari og kann við næstan ongari rennivenjing renna frá teim flestu, so frá honum fáa vit uttan iva eitt gott úrslit.

Einasta kvinna, ið íðkar triathlon fast her á landi er Súsanna Skylv, og verður spennandi at síggja hvat hon ætlar, aftaná sera góða úrslitið a Oyggjaleikunum.

Men ikki bara elitan hevur víst áhuga fyri FM 1/4-triathlon kappingini. Kári Simonsen og Evald Rasmussen, sum hava myndað eldra ættarliðið í triathlon, hava báðir sagt seg fara við, sjálvt um formurin ikki er av tí besta. So her er pláss fyri øllum.

Men er tað onkur, ið heldur teinin verða ov langan, so er eisini møguleiki at kappast á einum styttri teini, sum er

Skipað verður nevnliga eisini fyri 1/12-triathlon, har svimjast skulu 350 metrar, áðrenn 10 kilometrar verða súkklaðir og 2,5 runnir.

Fyrst verður svomið í Svimjihøllini í Gundadali, síðani út á súkkluna, og verður súkklað frá Svimjihøllini til rundkoyringina við Skansan og aftur til rundkoyringina R.C. Effersøesgøta/Norðari Ringvegur 1,5 ferðir, og so oman til Skógrøkt Landsins.

Her verður skift til renning, og runnið verður frá Skógrøkt Landsins niðan eftir Hvítanesvegnum til høgru eftir Skraddaragøtu, inn á gøtuna kring Skógrøktina og aftur til málið við Skógrøkt Landsins. Runnið verður 3 ferðir runt.

Tilmeldingin til kappingarnar fer fram á www.triathlon.fo